
TELDUSÍÐAN

Film- & tónleikavegvísarar


Á internetinum finnir tú upplýsingar um nýggjast biograffilmarnar, sum ikki eru at finna betri aðra staðni. Til ber eisini at hoyra brot úr øllum handaslag av tónleiki. Alt hetta er ókeypis

TEKSTMASKINAN

Filmtænastan eitur Motion Picture Guide. Har eru fleiri enn 40.000 ummæli av ymsum filmum og 750.000 milliónir filmografi við skematiskum informatiónum um filmarnar og persónarnar aftanfyri. Har eru samrøður, slatur og aktuell tíðindi og alt innan bransjuna.



Webstaðið Tunes á adressini http://www.tunes.com er eitt postordrafirma, sum ger nógv fyri kundarnar. Her ber til at hoyra brot úr fleiri túsund plátum, sum eru í handlinum og lesa um einstøk album



Motion Picture Guide er eitt gigantiskt filmsleksikon og tíðindastað. Ert tú áhugaður í slíkum, er menuin her ein av teimum best nøktandi, tú kanst finna. Her er alt frá Oscarvinnarum til Tarantinos nýggjastu ætlanir um avloysar til Pulp Fiction. Serliga er talan um amerikanskar filmar. Einasta CD-leksikoni, sumhevur meira at bjóða enn Motion Picture Guide er All Mocie Guide hjá Corel. Internetadressan er: http://www.motionpicture.com

Tú kanst leita eftir tituli og sjónleikara ella eini blanding av báðum, og har eru sambindingarliðir víðari til biografar um øll, ið við eru í filmunum ella til teir filmir, sum ávísur sjónleikari hevur verið við í. Tí verri ber ikki til at síggja filmskut.

Tónleikur á netinum

Hinvegin ber til at hoyra nógvan tónleik á netinum.

Tunes er ein online tónleikahandil, har til ber at hoyra 30 sekund ljóðkut úr teimum plátum, ið eru at fáa í handlinum.

Kutini verða spæld via tað sonevnda RealAudio skipanina, har ljóðkutið verður heintað av servaranum, meðan lurtað verður. Tí nýtist tær ikki at bíða so leingi fyri at hoyra.

Ljóðgóðskan kann vera rættuliga góð - um modemið er nóg skjótt og ikki ov nógv ferðsla er á netinum.

Webstaðið er eitt postordrafirma við umfatandi tænastu. Har verður handlað við ikki færri enn 30 ymsum tónleikakategorium.

Nógv umtala er um allar titlarnar og upplýsingar um øll tey, ið viðvirka á plátunum og har eru eisini discografiir við listum yvir album, sum einstøku tónleikararnir eisini hava verið við í.

Teldu-tíðindi

Nýggjar skriftir

Tað hevur í áravís verið kríggj millum PostScript hjá Adobe og TrueType hjá Microsoft. Kríggið byrjaði, tí, tí at Microsoft helt, at skriftirnar hjá Adobes vóru alt ov dýrar og avmarkandi fyri møguleikarnar hjá Windowsnýtarunum.

Tí finn Microsoft upp á teirra egnu TrueType tøkni, sum gav nýtarunum góðar skriftmøguleikar fyri ein nógv lægri prís.

Nú eru hesi bæði felløg vorðin samd um ein felags standard, nevndur OpenType, sum aftur at kann nýtast bæði á pappíri og á Netinum. Tað merkir, at nú endiliga verður lætt at síggja ymsar skrifttýpur á eini websíðu.

Tað eru góðir møguleikar fyri, at OpenType verður tann nýggi standardurin fyri nýtslu av skriftum til bæði pappír og on-line-nýtslu. Skriftinar væntast at koma út til almenna nýtslu fyrst í komandi ári.

Pentium II

Intels Pentium II prosessor er ein Pentium Pro við MNX og eyka tuning.

Hesin kemur við eini ferð upp á 300 MHz á marknaðin hendan mánaðin.

Longu frá byrjan fara fleiri av teimum stóru framleiðarunum vera klárir til at lata maskinum við chippinum, tá Intel hesaferð hevur sastsað upp á lata øll tey chips, sum brúk er fyri, lopngu frá byrjan.

Men brúk verður kanska ikki fyri so mongum. Slatrið sigur, at tað nýggja chippið í skjótastu útgávuni fer at kosta upp móit 15.000 krónum - altso næstan tríggjar ferðir so nógv, sum ein Pentium/200 við MMX kostar í løtuni.

Prísirnir væntast at fara niður longu í heyst, serliga um AMD sum væntað fer at kappast við Intel.

So tað er helst best at útseta stóra pc-keypið…

Takt og tóni

Tað snýr seg um at skikka sær pent - eisini tá tú er uttanlands. Á webadressuni http://worldculture.com kanst tú lesa um allar skikkir, sum tú kansta bróta úti í heimi

Anti-Virus

McAfee - heimsins stórsti framleiðari av antivirusforritum, hevur júst røttu og bestu forritini til at verja tygara dáta móti skaðiligum telduvirusum.

VIRUSSCAN™ - Finnur og burturbeinir kend og nýggj telduvirus á disklum, fløgum, harðdiskum og líknandi dátagoymslum. VirusScan fæst til DOS, Windows, OS/2, Machintosh og UNIX.

WEBSCAN™ - Kannar forrit og dáta, ið verða móttikin um internetið. WebScan virkar saman við NetScape, MS-Explorer og fleiri øðrum internet forritum.

NETSHIELD™ - Verður lagt á net-servaran og kannar øll dáta og forrit, ið verða goymd ella lisin á servaranum. NetShield fæst til Novell NetWare og Windows NT-server

WEBSHIELD™ - Ein sokallaður "Firewall", ið verjir Web-servaran móti telduvirusum

BOOTSHIELD™ - Verjir móti bootvirusum við at kanna bootsectorin tá teldan startar.

ROMSHIELD™ - Er ein bootprommur, ið verður settur á netkortið. RomShield kannar bootsectorin fyri telduvirus áðrenn stýriskipanin verður innlisin.

McAFEE

690 Oyndarfjørður, tlf. 44872
fax. 44873, e-post: mcafee@olivant.fo

IBM

ARBEIÐS- OG SPÆLI-FRØÐI

Líka mikið hvat tú ætlar at nýta telduna til: við IBM Aptiva fært tú ríkiliga ferð, megi, minni og tillagingarmøguleikar í eini samanseting, sum gevur framúr orku og nærum óavmarkaðar víðkanarmøguleikar, so at teldan kann tillagast framtíðini og - ikki minst - tínum tørvi.

Úr 133 Mhz til 200 Mhz v/ MMX



DØMI:
IBM APTIVA 445:
133 Mhz,
16 MB EDO-RAM,
2 GB harðdisk,
skermur 15“,
8xCD-rom
v/ hátalarum og hópin av programmum/spølum, t.d. Lotus Smart Suite og MS-Works

14.800,- v/ MVG

Figgingardømi:
Útgj.: 4.500,-
pr.mð./18 mð.: 650,-

COM DATA

Klaksvík - tlf. 56173
Saltangará - tlf. 49840
Tórshavn - 16173